*Orð: Eirikur í Jákupsstovu*
*Myndir: Álvur Haralsen og Sonja I. Jacobsen*

# Turrligur Fjarðafestivalur

**Tað er bara einaferð komið fyri, at tað er turt á Fjarðfestivalinum, men í ár er festivalurin aftur sloppin av við váttliga frámerki, hann hevur havt seinastu árini**

**Inni í Kelduni í Skálafirði er Fjarðafestivalurin í gongd við fullari ferð, men hann kundi eins væl verið uttandura í ár. Hann byrjaði longu klokkan 18:30, tá Regin Jacobsen, sum gjørdist ársins leiðari, setti festivalin.**



*Vinjard Johansen, ein av fyriskiparunum - her saman við øðrum festivalgestum - kann vera væl nøgdur við Fjarðafestivalinum 2009*



*Í fjør gekk alt ímóti Superhero úr Skotlandi, men í ár fingu teir løn fyri stríðið*

# Superhero við jobstoli

**Í fjør gekk alt ímóti hjá Superhero. Alt gekk ímóti, men teir megnaðu hóast alt at halda ein fína konsert. Í ár var øðrvísi, tí tað allarmesta bar til**

Tá Superhero vóru í Føroyum í fjør var alt ímóti teimum. Regnið oysti niður og teknikkurin sveik teir ferð eftir ferð, samstundis, sum teir vóru hálvt triðja døgn seinkaðir, áðrenn teir sluppu á pallin, har teir sum Job, stríddust hóast alt gekk ímóti.

Í ár var øðrvísi. Flogfarið lendi í Vágum eitt heilt korter, áðrenn tað átti. Pallurin er innandura, og høvdu teir vilja verið úti, so kundu teir verið úti, tí tað er av fagrasta festivalveðrið í kvøld. Og teknikkurin vildi bara alt tað, sum bólkurin vildi, og tí er ikki at taka munnin ov fullan at samanbera tolið hjá Superhero við Job, tí nú fingu teir løn fyri stríðið.

Tí tað riggaði væl, og bønarløtan um miðja konsert savnaði bólkurin øll saman, har teir bóðu til og greiddu frá, at einasti vegurin til harran er gjøgnum Jesus, og fólkið tók undir.

## Villir eftir bønarløtu

Tá bønar løtan var av, vóru nøkur, sum fýltust á, at hendan løtan tók eitt sindur frá stemninginum, sum varð pumpaður upp gjøgnum fyrra partin av konsertini. Og tá teir byrjaðu aftur spældu teir eisini eitt rættiliga álvarsamt lag helst fyri at undirstrika, at bólkurin er meinti bønirnar í álvara, men tá hetta tunga lag var farið afturum sleptu teir flestu hemningunum og hugnaðu sær óført fyri rest.

## Uppstillingin

Tungar trummur, snjallur gittari og ein sangari, sum veruliga meinar tað hann syngur. Bassleikarin gongur við obligatorisku flættunum og tann smædni trummuspælarin, hevur helst verið skeldaður í kamari sínum í Skotlandi, tí hann hevur larmað ov illa. Tí hann sat og hugdi niður í trummurnar tað mesta av tíðini.

## Nógv ungfólk

Hóast rættiliga nógv fólk vóru inni í salinum á Kelduni, so var fyri tað mesta ungfólk, ið hevði leitað sær inn í hølini.

Teimum dámdi heilt væl, tí tá bólkurin ætlaði at gevast var dómurin greiður. Tey mongu ungu fólkini skríggjaðu, hoppaðu, klappaðu og trampaðu, til bólkurin kom uppaftur og spældi eykalagið.

Hinvegin vóru tey eldru ikki so nógv at síggja, hóast tónleikurin og boðskapurin ikki vóru so nógv øðrvísi, enn nógvir aðrir bólkar, sum eldri fólk eisini fegin vilja hoyra.